# Tíðargrein

Thomas Arabo





# Almennar skipanir eru til fyri fólkið – ikki øvugt!

*15 ár við Finn Norman*

Tað eru nú eini 15 ár síðani, vit fingu Finn Norman Christensenbygnaðin. Hann hevur ongantíð riggað, og hann riggar framvegis ikki. Bygnaðurin er ov stórur, dýrur og óliðiligur. Hann hóskar seg snøgt sagt ikki til føroysk viðurskifti.

Hetta hava politikarar fingið at vitað í mong ár, men tað vísir seg ikki at vera nakar vilji til at fara í holt við henda trupulleika.

Viðhvørt fær man varhugan av, at politikarar, sum koma í Tinganes, gloyma, at almenna skipanin er til fyri borgaran og ikki øvugt. Um vanligi føroyingurin heldur, at hann fær for lítið burtur úr almennu skipanini og almennu umsitingini, sum hon er uppbygd í dag, so nyttar tað ikki hjá landsstýrisfólki at spyrja umsitingina, hvat hon sjálv heldur. Tað svarið kenna vit frammanundan.

## Hálva milliard eftir hæli

Nú tá vit standa framman fyri einum figgjarlógarhalli upp á ein hálva milliard við nøkrum sum líkist heimsins hægsta skattatrýsti og heimsins hægsta livikostnaði, so er greitt, at man ikki bara kann skatta seg úr trupulleikanum. Tað er tíð at hyggja upp á onnur alternativ.

Gamani er tosið um tilfeingisgjald skilagott, um skipanirnar verða gjørdar ordiliga, men ikki sum nú, har man kemur við einum skatti á tær dugnaligu fyritøkurnar í fiski- og alivinnuni og letur tær ódugnaligu sleppa undan. Skal man hava tilfeingisgjald, so skal tað gerast konsekvent og verða gjøgnumtonkt.

Tlifeingisgjald ella ikki, so má man fara í holt við at spara í okkara almennu umsiting. Vit hava ikki ráð til eina danska umsiting í Føroyum. Norman Christensen bygnaðurin má tí broytast, og aðalráðini mugu í hvussu so er fækka niður í fimm ella seks aðalráð. Viðkaðar heimildir mugu leggjast út til stovnar, so vónleysa toppstýringin, ið vit síggja í løtuni, heldur uppat.

## Javnaðarflokkurin friðað umsitingina?

Tað fellir mær nógv fyri bróstið, tá mínir floksfelagar í samgonguni ikki taka almennu umsitingina upp á tungu við einum orði, tá tosað verður um sparingar og skatting. Tað mátti verið fremsta uppgávan hjá Javnaðarflokkinum at kanalisera so nógvar pengar sum gjørligt út til tey, sum tørva teir við heimahjálp, sjúkrarøkt og ikki minst út í skúlaverkið. Umsiting er nakað, sum man noyðist at hava, men ein hevur eina skyldu til at gera hana so lítla og smidliga sum gjørligt, so so nógv sum møguligt fer til vælferðina. Um so er, at man við dagsins lógarsmíði og umsitingarmodelli noyðist at hava eina umsiting við næstan tveyhundrað fólkum í almennum stýrum, so er lógarsmíðið og umsitingarmodellið for vánaligt, og annað skinn má takast um bak – Kanska ov nógv blind lógarkopiering úr Danmark?

## Latið DIS'arnar fáa frið

At fara at pilka við DIS'arnar, sum Jóannes Eidesgaard leggur upp til, vil eg frámæla. Vandin fyri, at ungar rímiliga sterkar familjur flyta av landinum, er ov høgur. Sjóyvirmenn eru millum mest mobilu fólk í heimunum, og eg havi ein varhuga av - hetta burdi verið kannað – at útisiglarar, sum jú oftast eru menn í besta aldri við konu og børnum, eiga lívið - í hvussu so er tað unga lívið - í mangari bygd kring landið.

Farið so heldur í holt við umsitingina. Tað er skjótt hjá fólki uttan fyri umsitingina at gera eina nýggjan bygnað, sum er smidligari og bíligari enn tann núverandi. Tað liggur tungt á Javnaðarflokkinum og samgonguni at fáa hetta gjørt.

## Andstøðan hjálpir ikki

Úr andstøðuni er ikki nógv gott í væntu. Orðini hjá Høgna Hoydal á Fólkatingi um, at blokkstuðulin til Føroya átti at verða minkaður í einari tíð við hálvari milliard í halli, samstundis sum flokkur hansara er garantur fyri at almenna umsitingin framvegis skal vaksa eksplosivt, vísa, at har er eingin realitetssansur.

At seta blokkstuðulin í relatión til bruttutjóðarúrtøkuna, sum Høgni Hoydal ger, er bara fyri at royna at fyrigykla fólki, at blokkurin einki hevur at týða. Høgni Hoydal burdi heldur sett blokkin í relatión til útreiðslusíðina av figgjarlógini, og í % av kostnaðinum av almenna rakstrinum, so kundu ikki minst Høgnasa egnu veljarar sæð, hvat blokkurin hevði at týða fyri tey, og teirra arbeiðspláss.

## Tromin stendur í ljósum loga, og ein nevnd verður niðursett um hvønn lit húsini skulu hava

Javnaðarflokkurin eigur at gevast við friðingini av toppinum av almennu pyramidini, sum er miðsfyristingin, og fara í arbeiðsklæðini, so vit sleppa undan hesum vanvirðiliga, har man bara sparir niðast í almennu skipanini, har Palliba merkir tað meinast.

At Javnaðarflokkurin og samgongan brúka kreftir upp á eina grein 25 nevnd um stjórnarskipan í hesum tíðum, har tað búskaparliga brýtur í bæði borð, er púra ábyrgdarleyst og svarar til at fara at tosa um, hvønn lit húsini skulu málast, meðan øll tromin stendur í ljósum loga. Grundlógararbeiðið eigur í besta føri at verða lagt á ís, nú vælferðarsamfelagið er hótt, hóast vit hava eitt tað hægsta skattarýstið í heiminum við hartil hoyrandi hægsta livikostnað í heiminum. Har liggur uppgávan hjá Javnaðarflokkinum, ið eigur at bretta upp ermar og fara til arbeiðis og gera veruligar rakstrarsparingar úr erva í tí almenna, og ikki brúka tann víðagitna plenuklipparan, sum bara vísir vantandi rygg og onga raðfesting.